# Absalon við myndabók

*Føroyar er stutta og greiða heitið á myndabókini hjá Absalon Hansen*



Absalon Hansen hevur í nógv ár givið út føroyska myndakalendaran. Nú er hann aftur á gøtuni við nýggjari útgávu, men hesaferð er talan um eina myndabók. Slíka hevur toftamaðurin eisini givið út áður, men tað eru fimm ár síðani, og tí er kanska upp á sítt pláss við nýggjari útgávu.

Heitið á bókini er stutt og greitt Føroyar, og verða oyggjar okkara í hesari lýstar í myndum. Bæði romantiskt stillisligum landslagsmyndum, eins og harðbalna veðurlagið eisini eigur sítt pláss í hesi.

Bókin er kanska fyrst og fremst ætlað til útlendsk ferðafólk ella sum gáva til vinir og kenningar, sum eru stødd uttanlands. Men hon man so sanniliga eisini fáa sítt pláss í nógvum føroyskum heimum, soleiðis at vit eisini sjálvi kunnu minna okkum á, hvussu vakurt land okkara er.

Bókin er 152 vakrar litsíður til støddar. Tað er Wadmann Grafisk, sum hevur umbrotið og prentað bókina, ið er at fáa í bókasølum kring landið.

**-mørk**




Kundum og viðskiftafólki okkara verður ynskt eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár við tøkk fyri gott samstarv øll hesi árini.

Somuleiðis verður ynskt teimum nýggju eigarunum til lukku og góða eydnu framyvir.

Jólaaftan og jóladag er stongt
2. jóladag er opið kl. 13:00 - 23:00
Nýggjársaftan er opið til kl. 12.00
Nýggjársdag er stongt

HJÁ GUNLEIVI

TEAM85




OFFSHORE FAROES/2006
NORÐURLANDAHÚSIÐ
17. JANUAR 2006

Skrá og tilmelding á www.industry.fo
Seinasta freist at melda til er 9. januar 2006

OLJUVINNUFELAGIÐ · FAROE OIL INDUSTRIES' ASSOCIATION
Vinnuhúsið · P.O. Box 1038 · Smærugøta 9a · FO-110 Tórshavn
Tel. +298 30 99 00 · Fax +298 30 99 01 · www.industry.fo

VINNUHÚSIÐ
House of Industry